# Takksom fyri at Benjamin fær hjálp

**– Vit fegnast um, at Benjamin nú fær eitt dygdargott ansingartilboð, men samstundis er tað ørkymlandi, at vit noyddust í bløðini, fyri at fáa hjálp, sigur Eydna Skaale, mamma lítla Benjamin, sum Sosialurin skrivaði um í síðstu viku**

SOSIALMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*– Tað er fantastiskt, at vit nú fara at fáa eitt tilboð til Benjamin, sigur Eydna Skaale*

Fyri nøkrum mánaðum síðani varð dagstovnurin hjá Sernámsdeplinum niðurlagdur, hóast onki alternativt tilboð var til fjølbrekaðu børnini, ið sostatt komu í klemmu í skipanini. Eftir at Sosialurin í síðstu viku prátaði við foreldrini hjá lítla heilaskadda Benjamin, og soleiðis setti ljósmálan á trupulleikan, letur dagstovnurin nú upp aftur, og foreldrini fegnast sjálvsagt um, at ein loysn nú er funnin.

– Tað er fantastiskt, at vit nú fara at fáa eitt tilboð til Benjamin, og vit eru ómetaliga takksom fyri, at politisk stig vórðu tikin so skjótt, sigur Eydna Skaale, sum saman við manninum Ragnar við Streym greiddi frá støðu teirra í blaðnum mánadagin.

– Vit høvdu ikki roknað við, at ein loysn fór at koma so skjótt, tí eftir tí, sum vit fingu burturúr orðaskiftinum í blaðnum í síðstu viku, fór ein loysn kanska at koma einaferð næsta ár og talan var eisini um at seta ein arbeiðsbólk, sigur ein fegin Eydna, sum í løtuni er stødd niðri á Ríkissjúkrahúsinum, har sonurin Benjamin hevur verið undir skurði.

## Støðu fram í blaðnum

Seinastu mánaðirnar hava Eydna Skaale og Ragnar við Streym kima og meyla fólk niður, fyri at finna eina loysn á ansingartørvinum hjá 11 mánaðir gamla soninum Benjamin, sum fekk ein heilaskaða undir føðingini og er fjølbrekaður í dag.

Av tí at Benjamin hevur serligan tørv á einum dygdargóðum tilboði, sum skal vera stimbrandi og mennandi á einum høgum fakligum støði, lótu foreldrini seg ikki nøkta við at fáa ein tilvildarligan stuðul inn í heimi. Til endans vóru tey so ørkymlað av støðuni, at tey gjørdu av at standa fram í Sosialinum.

- Sjálvsagt fegnast vit um at Benjamin nú fær hjálp, men tað er samstundis ørkymlandi, at tað var neyðugt at kæra okkara neyð fyri almenninginum, sigur Eydna Skaale.

## Loysn í somu viku

Longu fríggjadagin kom eitt skriv frá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna-og heilsumálum, um at dagstovnurin á Sernámsdeplinum nú letur upp aftur, eftir at hava verið stongdur í fleiri mánaðir, hóast onki annað tilboð var til børnini.

– Nýggja tilboðið verður skipað sum eitt heildagstilboð á sama hátt sum á øðrum dagstovnum, segði Hans Pauli Strøm, í tíðindaskrivinum fríggjadagin. Og hann vísti á, at hann og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hava gjørt eina eitt árs avtalu um hesa loysnina, og at hetta komandi árið so skal brúkast til at finna eina varandi loysn.

## Hevur serligan tørv

– Hjá okkum hevði tað ikki verið nøktandi at fingið ein óútbúnan stuðul, sum ikki hevur førleika til at stimbra og stuðla Benjamin, tí hann krevur nógva venjing hvønn dag, um hann skal mennast, sigur Eydna Skaale, ið hevur verið í samband við nógv fólk innan sernámsøkið, umframt Javna, ið eisini hevur fylgt gongdini í málinum.

– Øll innan fakøkið fegnast eisini um at ein loysn nú kemur á økinum. Alla tíðina hava vit fingið boð um, at nú fór ein loysn at koma, og tí hava vit liva í vónini. Men nú er Benjamin 11 mánaðir, og vit hava ikki ráð til, at hann ikki verður stimbraður og mentur, sum hann átti. Við tilboðnum fáa vit eisini gagnnýtt serkunnleikin á Sernámsdeplinum, ið dugur at meta um og taka stig til stuðulstiltøk til Benjamin, sigur Eydna Skaale.




EFTIRLITSMAÐUR

Søkt verður eftir eftirlitsmanni sum avloysara at byrja 2. januar 2007. Starvið er tíðaravmarkað til 1 ár.

UPPGÁVAN
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða rókt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum roynd á økinum. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umfram Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á tlf. 35 04 28. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi
**í seinasta lagi 27. november 2006.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

STARVSFÓLK TIL KALDA KØK









**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.

Hotel Hafnia søkir eftir starvsfólki til kalda køk.

Arbeiði umfatar forrættir, dessertir, køkur, smyrjibreyð, sandwich o.l.

Útbúgving er ikki krav, tó er neyðugt at hava roynd innan øki.

Ynskiligt er, um starvið verður sett sum skjótast.

Meira fæst at vita við at ringja til Magna Jakobsen á tlf 21 12 81

Umsókn við avriti av prógvum og ummælum, skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*



*Hotel Hafnia*
*Hotellið í miðbýnum*
HOTEL HAFNIA